# Føroyar hava uppiborið at verða betri kendar

**Umheimurin kennir alt ov lítið til Føroyar og føroyingar, og tað er stór synd, halda fronsk sjónvarpsfólk, sum hava verið í Føroyum og tikið upp til tvær sjónvarpssendingar, sum verða sendar í fronkum sjónvarpi í heyst**

FREMMANDAVITJAN
*Edvard Joensen*



*Franska filmsliðið saman við tulkinum Elini Hentze, uttast høgrumegin, avmyndað á flogvøllinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** –Landið er ótrúliga vakurt, og fólkið er sjáldsama blítt og fyrikomandi.

Soleiðis ljóða nøkur av lovorðunum, eitt franskt sjónvarpslið, sum hevur verið í Føroyum seinastu dagarnar, hevur at bera fram um Føroyar og føroyingar.

Eitt sjónvarpslið frá almennu fronsku sjónvarpsstøðini, France 3, hevur seinastu tíggju dagarnar ferðast í Føroyum og gjørt upptøkur til tvær sendingar, sum sendar verða einaferð í heyst. Tann fyrra verður send í september, siga tey, meðan tey ikki vita nágreiniliga, nær tann seinna verður send.

Umframt at verða sendar á France 3, verða tær eisini sendar á franska TV 5, sum er fylgisveinasjónvarp og sæst í Føroyum, um ein hevur parabol móttakara. Tær verða sendar á báðum støðum samstundis og senditíðin er sunnudag.

Corinne Bia Rosa, sjónvarpskvinna, sigur við Sosialin, at umleið fýra milliónir hyggjarar síggja regluliga hesar sendingarnar, sum nevndar verða »Faut pas rêver«, sum merkir at gera dreym til veruleika.

Og tað er júst hetta, sendingarnar snúgva seg um. At fara hagar, ein bert hevur hoyrt og droymt um, men vanliga ikki kemur. Tey gera sjónvarpssendingar um vanlig fólk, sum búgva á ikki heilt vanligum støðum, sum tey taka til.

Í Føroyum hava tey tikið upp tilfar til tvær sendingar, sum verða um ræning í Skúvoy og um tyrluflúgvingina hjá Atlantsflogi, greiða tey frá.

Úti í Skúvoy hava tey verið í nakrar dagar og fylgt skúvoyingum, meðan teir rændu havhestaegg. Tey láta væl at, og blíðskapurin var óførur siga tey.

Síðan fóru tey til Gásadals við tyrluni og hittu har avgreiðslukonuna og postmannin, sum tey hava tosað við. Eisini vóru tey úti í Koltri og hittu bóndafólkini har. Umframt hava tey so flogið við tyrluni kring oyggjarnar og tikið myndir.

Sendingarnar verða skipaðar soleiðis í franska sjónvarpinum, at ein vertur er, sum sigur frá sendingunum, umframt ein gestur, sum ummælir tær so hvørt. Hesin gesturin er altíð onkur, sum á einhvønn hátt er rættiliga kendur. Tað verið seg ítróttarfólk, sjónleikari, politikari, ellahvat tað nú kann vera.

Trý evni verða viðgjørd í hvørjari sending, og er hvørt innslagið upp á 12 minuttir. Eitt er úr Fraklandi, eitt er aðrastaðni úr Europa, meðan tað triðja er heilt aðrastaðni úr heiminum.

Grundin til, at tey hava valt at koma til Føroya, sigur Corinne Bia Rosa, er at hon sá eina grein um Føroyar í einum fronskum tíðarriti.

Hetta gjørdi so, at hon fekk hugskotið til at koma hendanveg, og tað angrar hon ikki, sigur hon.

– Tað er í grundini løgið, at fransmenn vita so lítið um Føroyar, tí hetta er eitt so frálíkt land og so frálíkt fólk, at tit hava betri uppiborið.

Um fólkið, her býr, sigur ljóðmaðurin, Michel Magnien, at tað er ein merkilig blanding, hann ikki rættiliga kann seta í bás.

– Føroyingar líkjast ikki øðrum norðurlendingum. Til tess eru teir ov fyrikomandi. Men teir líkjast heldur ikki latínarum. Til tess eru teir ikki nóg ágangandi. Teir eru varnir at byrja við, men lættir at koma í samband við kortini. Ein blanding av víkingum og latínarum, heldur hann.

Og tað undrar hann einki petti, tá tulkurin á ferðini, Elin Hentze, so greiðir honum frá, at ivaleyst er eisini franskt blóð í fleiri føroyingum, eftir sum allar sjórænarasøgurnar vita at siga frá.

# Innrætta hølini til Skipaeftirlitið

**Farið er undir at innrætta nýggju hølini hjá Skipaeftirlitinum í Miðvági. Stjórin á Skipaeftirlitinum væntar, at klárt verður at flyta inn 1. august**

SKIPAEFTIRLITIÐ
*Edvard Joensen*



*Arbeitt verður nú við at seta Gomlu Smiðju í Miðvági í stand til Skipaeftirlitið at húsast í. Flutt verður væntandi inn tann 1. august*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Skipaeftirlitið fer at flyta úr Havn til Miðvágs 1. august í ár, væntar stjórin, Óli Hans Hammer Olsen.

Arbeitt verður nú við at seta Gomlu Smiðju í Miðvági í stand. Innrættað verður til skrivstovur, sum Skipaeftirlitið skal húsast í.

Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum sigur, at har vóru bara fýra betongveggir í húsinum, so tað verður nakað væl at seta upp afturat, áðrenn klárt verður at flyta inn.

– Men tá so liðugt er, hava vit óvanliga góðar umstøður at arbeiða undir, sigur hann.

Hann heldur ikki, at tað ger umstøðurnar nevnivert verri, enn tær eru í dag, at Skipaeftirlitið liggur í Miðvági.

Funnist hevur onkuntíð verið at, at eftirlitið er flutt burtur frá støðum, har eitt nú skipasmiðjur liggja. Men tað heldur stjórin ikki vera nakra forðing fyri arbeiðinum.

– Avstandir merkja einki í dag, sigur hann. Eftirlitsmenninir ferðast kortini nógv millum havnirnar, har skipini liggja, so tað kann fyri so vitt gera tað sama, um teir ferðast úr Vágum ella umvent, heldur stjórin á Skipaeftirlitinum.

Hann vísir á, at tað er eingin, sum tosar nakað um, at tey ferðast til Havnar til arbeiðis hvønn dag, og teinurin er tann sami hinvegin, staðfestir hann. Eisini verður undirstjóvartunnilin latin upp um heilt stutta tíð, og so eru Vágarnar eisini bundar at meginøkinum, og tað tekur ein góðan hálvan tíma at koyra úr Miðvági til Havnar fyri at brúka tað dømið, vísir Óli Hans Hammer Olsen á.

Tað arbeiða í løtuni sjey fólk á Skipaetirlitinum. Men søkt fer at verða eftir einum eftirlitisfólki aftur at teimum fýra, sum eru. Síðan eru tvey skrivstovufólk umframt stjóran sjálvan.

Seks teirra, sum í dag arbeiða á Skipaeftirlitinum, flyta við arbeiðsplássinum vestur til Miðvágs, meðan annað skrivstovufólkið heldur við hava sitt arbeiðspláss í Havn. Viðkomandi fer í annað starv í Fiskimálastýrinum, og eitt skrivstovufólk, sum býr í Vágum byrjar í starvi tann 1. juni, sigur Óli Hans Hammer Olsen.

Um kostnaðin av at seta hølini í stand til Skipaeftirlitið vil Óli Hans Hammer Olsen ikki siga nakað. Tað er eigarin, J.K. Joensen í Miðvági, sum stendur fyri tí, meðan Skipaeftirlitið sjálvt skal fáa innbúgvið til vega.

Hvat innbúgvið fer at kosta, er ikki avgjørt enn, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum, tí tilboðini eru ikki klár.



# Katrin Dahl fer frá sum fyristøðukvinna

**– Eg havi ment meg upp at fara frá meðan eg enn havi tað gott og meðan eg havi tíðina fyri meg, sigur Katrin Dahl, sum fer frá fyri aldur eftir fimtan ár sum fyristøðukvinna á Hvíldarheiminum Nainu, ið hevur verið eitt kærkomið stað hjá nógvum hundrað kvinnum í Føroyum í 66 ár**

STARVSTÍÐ
*Turið Kjølbro*



*Katrin Dahl fer frá fyri aldur sum fyristøðukvinna á Hvíldarheiminum Nainu. Men av tí, at stovnurin vantar avloysarar, arbeiðir Katrin Dahl sum sjúkrasystir á stovninum nakrar vikur í summar. Mynd: Jens Kristian Vang*

Í gjár var seinasti arbeiðsdagur hjá fyristøðukvinnuni á Hvíldarheiminum Nainu í Havn, Katrin Dahl. Eftir fimtan ár sum fyristøðukvinna leggur hon nú frá sær fyri aldur.

Tað eru 44 ár síðani Katrin Dahl, sum er ættað úr Kvívík, fór at læra til sjúkrasystir, og øll árini síðani hevur arbeitt í yrkinum. Hóast hon verður 68 ár í komandi mánaði, er tað kortini við sorgblídni, at hon fer úr starvi.

– Broytingin ræðir meg ikki. Eg eri glað fyri, at eg havi tikið meg saman at fara frá meðan eg havi tað gott og meðan eg havi tíðina fyri mær. Og eg gleði meg at sleppa sjálv at gera av, hvat eg skal brúka tíðina til. Eg havi nógv at taka í og fara til, eitt nú Tilhaldið. Havi stóra familju og seks ommubørn, sum eg ikki havi havt nóg mikið av tíð til. Tað verður stuttligt at sleppa av vera meiri saman við teimum øllum, sigur Katrin Dahl.

Katrin Dahl hevur havt eitt sera virkið arbeiðslív. Meðan hon hevur verið fyristøðukvinna á Hvíldarheiminum, hevur hon sitið sum limur í Tórshavnar býráð í nógv ár umframt tikið lut í nógvum nevndararbeiði. Býráðsarbeiðið er slept, men enn er hon í nøkrum nevndum.

Nú hon fer frá, letur hon Hvíldarheimið upp í hendurnar á Ásu Kiærbech Olsen, sum 1. juni tekur við sum fyristøðukvinna. Hon hevur starvast sum lærari á Sjúkrasystraskúlanum.

– Tað er gott at lata ábyrgdina til eina kvinnu, eg havi álit á, og tað er gott at fara frá einum stovni, sum virkar væl. Nógv er hent á Hvíldarheiminum, síðani tað varð stovnað í 1936 og síðani eg tók við. Hóast bygningurin er nútímansgjørdur og umvældur nakað, eru stílurin og andin varðveittir. Stovnurin heldur enn sum áður fast við endamálsorðingina hjá stovninum, sum er, at húsið er fyri kvinnur, sum tørva hvíld eftir sjúku ella tí tær eru niðurundirkomnar. Orsøkirnar til, at kvinnur tørva hvíld eru aðrar í dag enn fyri 66 árum síðani. Tá í tíðini høvdu kvinnur tað trupult og strævið, tí kanska tríggjar-fýra familjur búðu í sama húsi. Kvinnurnar høvdu alla ábyrgdina av húsinum, børnunum, teim gomlu og av øllum arbeiði úti og heima, meðan menninir vóru á sjónum. Hesar kvinnurnar kendu einki til hvíld og tí hevur tað verið ógvuliga kærkomið hjá teimum at koma á Hvíldarheimið. Men tað er tað eisini hjá kvinnum í dag, um enn tíðirnar eru broyttar. Í dag koma tær flestu kvinnurnar beint av sjúkrahúsi eftir skurðviðgerð og sjúku, av øllum deildum og øllum sjúkrahúsum. Flestu kvinnurnar eru í aldrinum 40-60, nakrar eru eldri. Og at tær koma hendavegin, áðrenn tær fara heim, forðar fyri, at tær verða innlagdar aftur, sigur Katrin Dahl.

Í endamálsorðingini fyri stovnin kunnu menn eisini koma á Hvíldarheimið, um pláss er.

– Menn koma eisini, men kvinnur hava størri tørv at koma á Hvíldarheimið. Tá ið ein maður verður útskrivaður av sjúkrahúsi, stendur ein kona við opnum ørmum og tekur ímóti honum og røktar hann, til hann kemur á føtur aftur. Og eg eri sannførd um, at tað ganga nógv, nógv ár áðrenn hetta verður broytt. Verður ein kona sjúk, bíða øll eftir, at hon verður frísk aftur og kemur heim, sigur Katrin Dahl bersøgin.

Í dag hósdag skipa starvsfólkini á Hvíldarheiminum fyri móttøku á stovninum í sambandi við, at Katrin Dahl fer frá. Fólk eru vælkomin inn á gólvið ímillum kl. 14 til 17.00.

# Jútsk list í Listaskálanum

**Vælmannaða Listasamtakið Jylland er komið til Føroya at sýna fram danska list**

FRAMSÝNING
*Turið Kjølbro*



*Verk av Jan Riishede*

Leygardagin letur forkunnug framsýning upp í Listaskálanum í Havn við vælmannaða Listamannasamtakinum Jylland. Listamannasamtakið telur nógv listafólk, ikki bert fólk, ið eru ættað úr Jútlandi, men góð, kend og roynd listafólk úr øllum Danmark. Verk av átjan listafólkum verða sýnd fram í á vitjanini í Føroyum. Birgit Kleist, ríkisumboðsmaður, letur framsýningina upp, og undir setanini spælir Jørn Særker Sørensen, listamaður, egnan jazztónleik á klaveri.

Tíggju av teimum átjan listafólkunum í Listamannasamtakinum vera hjástødd leygardagin. Tey eru Erik Argus, Leif Kath, Kurt Tegtmeier, Peter Hentze, Anders Kirkegaard, Erland Knudssøn Madsen, Peter Martensen, Jørn Særker Sørensen, Poul Pedersen og Erik Winckler. Somuleiðis er ferðaleiðarin Poul Møller-Mikkelsen við. Umframt taka hesi eisini lut í framsýningini, Poul Anker Bech, Sys Hindsbo, Dyke Johansen, Erling Jørgensen, Jan Riishede, Poul Skov Sørensen, Teddy Sørensen og Karin Nathorst Westfelt.

Listasamtakið heldur til í Jútlandi, í mentanarbygninginum í Århus, har fólk við áhuga fyri list hava møguleika at hitta listafólk og síggja teirra verk í vøkrum umhvørvi. Listamannasamtakið hevur 23 ár á baki, og seytjan av teimum, sum stovnaðu samtakið í sinni, eru framvegis við, umframt onnur, sum eru komin afturat hesi árini síðani.

– Tað er bæði ein stór æra og ein stór avbjóðing at gerast limur í Listamannasamtakinum, sigur Ove Mikkelsen, formaður í mentunarnevndini í Århus Amt í bóklingi um samtakið.

Í einum slíkum bólki er tað altíð spennandi at fáa vitjan frá øðrum listafólkum, og í fjør fingu Jesper Rasmussen og Hans Pauli Olsen møguleikan. Hans Pauli Olsen er sum kunnugt føroyingur og samstundis ein av fremstu myndhøggarunum í danska ríkinum.

